# Brennivargurin úr Sullom Voe

TÓRBJØRN JACOBSEN



Tað sum líktiskt einum sjálvkravdum sólkongi fyri sløkum fýra árum síðani er nú mest átøkt einum politiskum brennivargi. Hetta er ikki ókent fyribrigdi, táið niðurteljingin er byrjað. At menn taka alla skipanina við sær í fallinum. Sambært Sosialinum reikar Eidesgaard runt í norðurhøvum í løtuni, og leitar eftir sær sjálvum, ella flokkinum, sum hann einaferð var formaður fyri. Har eru lætnir so nógvir fólkafloksbollar og stúgvingur í soðið, í verandi valskeiði, at tað tynnist ikki aftur. Helst skal útsøgn hansara skiljast soleiðis, at hann er komin í eina politiska samleikakreppu. Soleingi hendan krisan stendur uppá, er ikki ráðiligt, at hann umboðar føroysk samfelags áhugamál. Tað er staðiliga prógvað fleiri ferðir meðan hetta fólkaflokslandsstýrið hevur sitið undir hansara pseudoleiðslu.

Maðurin skrivar undir alt sum fyri hondina rekur. Treytaleyst. Krøv og samráðingartreysti er ein bygd í Sibiria. Uttanríkispolitiska heimildarlógin og yvirtøkulógin eru bestu dømini. Fogh og Møller smoygdu hendan nýkolonialistiska hamin niður yvir herðar hansara sum eitt endaligt danskt konsept. Tað var ikki so frætt at blóðið ornaði. Heldur ikki táið teir vendu honum á gáttini í stjórnarbygninginum á Sláturhólmanum á sinni, tí at endurskipaði valdsleistur teirra mótvegis Føroyum ikki var liðugt snikkaður til, til undirritingar. Grønlandssáttmálin, eitt samankók av tí sum longu var galdandi ímillum londini frammanundan, - ein tóm media stand-up comedy. Íslandssáttmálin er annað dømið. Ein kladda sum lá úti í Tinganesi á vári 2004. Arvur eftir fullveldislandsstýrið. Skrivað var undir í óðum verkum, hóast politiska inkubatiónstíðin ikki var gingin, og skilið er hareftir. Napoleón tapti slagi við Waterloo orsakað av darvandi gylliniæðrum – hæmorroidum – hann fekk ikki sitið á rossinum. Eidesgaard er farin at líkjast eini endurtøku av hesi tragediuni.

Táið føroyingar fóru undir at leggja kolvetnisviðurskiftini í lóg, gjørdist bryggjukanturin eitt høvuðstema. Meiningarnar vóru ymiskar. Marknaðarkreftir versus protektionismu. Skuldi kolvetni verið undir Føroyum, so stendur í hvussu er tað eftir, at júst hendan ásetingin kundi verið brúkt sum trumfur í eini samráðing við konsessiónshavararnar í føroyskum øki. Tvs,. at ynsktu oljufeløgini framleiðsluna í land aðrar staðir, eitt nú í Sullom Voe, so mátti nýtt samráðingarumfar til, um føroyska partin av ágóðanum. Tey kendu fyritreytirnar táið loyvið varð latið, tí hevði tað neyvan komið óvart á hesar internationalu oljurisarnar, at matrikulhavarin og løggevarin á økinum, tók málið uppaftur, um fyritreytirnar broyttust munandi, sum í hesum førinum við bryggjukantinum.

Nú er løgmaður aftur volaður. Suðuri í Hjaltlandi. Sjálvt um hann sat við kleyvar frúgv í hondini. Teir hava hildið honum til, á eini Energy from the Edge ráðstevnu. Hann hevur virkað sum eitt slag av stuntmanni, skilst. Virkaði hann sum slíkur vegna seg sjálvan ella fyri Javnaðarflokkin, so var tað sínar sakir, trupulleikin er bara, at hann gøllheldur áhugamálini hjá eini heilari tjóð, táið hann ferðast kring heimin í leitanini eftir sínum egna politiska identiteti.

Nú hevur hann vegna Føroya Landsstýri lovað hjaltlendingum høgt og heilagt, at komandi kolvetnisframleiðslan undan Føroyum skal í land í Sullom Voe. Sagt á eini vísindaligari kongres, tá bindur borðið. Í hvussu er soleingi viðkomandi situr sum kolonibestýrari í landinum. Okkara spurningur er, hvør ið hevur blástemplað hendan nýggja politikkin. Hevur hann politiskan dekning í Fólka- og Sambandsflokkinum fyri hesi nýggju leið andvegis føroysku kolvetnislógini? Vórðu Kaj Leo og serliga Jørgen tiknir í eið, áðrenn hann slepti sær av við ein hin besta samráðingartrumfin føroyingar hava í mun til professionellu oljufeløgini, sum virka í okkara øki? Hitt hugskotið, um at brúka tíggjund av kolvetniságóðanum til gransking í varandi orku er skilagott, men hví gleppur hetta manni av munni uttanlands, uttan nakra sum helst viðgerð í politisku skipanini í forhond?

Nú Jóannes Eidesgaard er farin at spæla hazard við føroysku tjóðarvirðunum, er tíðin komin, at onkur intervenerar. Maðurin má setast frá valdinum skjótast gjørligt, áðrenn húsini brenna, og login stendur í loft, eins og úr stóru skorsteinunum í Sullom Voe. Kanska átti Løgtingið at sýtt honum útferðarloyvi higani og til valskeiðar enda, bara fyri at eitthvørt skal vera at brúka valdið til, eftir at Fólkaflokksregime undir hansara leiðslu umsíður fer til hús, seinast 19. januar 2008. Vit hava í hvussu er ikki brúk fyri at hava ein desillusioneraðan politiskan brennivarg gangandi leysan, hvørki í Sullom Voe ella aðrar staðir uttanvert landoddarnar. Tíansheldur í Føroyum.

# Ikki eisini tú, Jørgin!

NAPOLION MAGNUSSEN
Miðvágur



Ein má sterkt umhugsa at fara upp í landspolitikk, nú nógvar atkvøður ganga leysar!

Dagur og Vika týskvøldið 11/9 má sigast at verða søguligt. Vit vóru vitni til, at nýggi formaður Fólkafloksins hálvgum avreiddi flogvøllin í Vágum til Havnarmenn; Latið okkum fyrst útbyggja í Vágum, síðani byggja vit ein afturat, var kenslan, vágafólk og onnur sótu eftir við, tá ið Jørgin hevði sagt sítt. Tá sjálvt vágatingmenn byrja at lora, tá í stór kanning/frágreiðing sigur, at tað sera er ivasamt um til ber at gera so frægt sum ein 1800 metra langan vøll á Glyvursnesi, muga vit skriða okkum í nakkanum. Her vesturi muga ganga nakrar atkvøður leysar, í øllum føri allar tær í Sørvági, ið bara velja Jørgin, tí hann er sørvingur. Væl vitandi, at 50.000 fólk ikki kunna hava meira enn ein flogvøll opnan er tað greitt, at tá ein fyrst er opnaður á t. d. Glyvursnesi, kann ein ikki standa hálv opin aðrastaðni. Tað er jú alt ov dýrt.

Hví lesa tit á Vinnuvitan, Bjarni Djurholm, Poul Michelsen (var tað ikki hann, ið brúkti nógvar pengar sum borgarstjóri í Havn til kanningar við ongum úrsliti orsaka av mjørka?) ella onkur annar av hesum møsnarunum við ongum jørðforbindilsi, ikki hesa kanning/frágreiðing? Tit hava kanska lisið hana, men lopið tað týdningarmesta um? Hví ikki halda seg til veruleikan?

Øll, ið vilja vita tað, vita, at ringasta mjørkahol í Føroyum er Glyvursnes. Fyri nøkrum árum síðan segði ein vitapassari, ið arbeiddi á Boruni mær, at teir sóu ikki land í nærum 5 (fimm) vikur á Glyvursnesi, meðan tað mestsum hvønn dag var klárt har úti. Og eg veit, at hesin maður eisini hevur fortalt Bjarna Djurholm hetta, tá Bjarni hevur verið túr í Nólsoy. Eg minnist eisini, at Henrik Old hevur nevnt júst hetta tíðarskeiðið á tingsins røðarapalli, tí ikki sást land frá Smyrli, tá komið var norður móti Havnarlandinum. Og eg havi sjálvur verið í Nólsoy fleiri samanhangandi dagar tey seinastu 21 árini og sæð inná mjørkan, dag út og dag inn.

Vit fara í gongd við at útbyggja her vesturi, vónandi til 1800 metur, soleiðis er veruleikin. So nú skula tit øll, ið siga nakað annað, halda munn um nýggjan flogvøll í nøkur ár. Og eftir at útgerð er uppsett á nøkrum støðum í landinum at kanna sýni og hevur samlað dáta inn gjøgnum 3-5 ár, eri eg, eins og hini, sum fyrihalda seg til veruleikan, vísur í, at Glyvursnes aldri verður tikið upp á tunguna aftur sum eitt alternativt! Í øllum førum ikki fyrr enn tað er fullkomiliga forsvarligt hjá einum blindum at stýra og lenda einum flogfari. Og 2700-3000 metur? So verður tað í undanbrekku ella mótbrekku, tí ikki kann vøllur á Glyvursnesi vera longri enn hasar 1800 metrarnar uttan hann skráar, ella brúktar verða minst 2 milliardir bara til at spreingja Glyvursnes slætt við. Lesi bara kanningina/frágreiðingina hjá Asplan.

Og mjørkin? Hann er, sum vant, mestur á Glyvursnesi, bæði á lágum vesturættunum og eysturættunum! Tað er bara at hyggja, tá trupulleikar eru við honum í Vágum. Tá er hann sum oftast verri og í longri tíð á Glyvursnesi.

Góði Jørgin systkinabarnið; royn og fá eitt valdømi til komandi val, um tú vil verða afturvaldur, tí atkvøðurnar fækkast við hetta lag!

# Bjarni Djurholm sleppur ikki at avhøvda brúkaramyndugleikan

JOHN JOHANNESSEN
løtingslimur
www.john.fo



**Brúkaramyndugleikin skal verða veruleiki. Marknaðarføringslógin skal leggjast fyri tingið í tí líki, sum Brúkarasamtakið, Arbeiðarafeløgini og Vinnuhúsið vóru samd um. Fólkaflokkurin skal syrgja fyri at halda seg til kravið um veruliga brúkaraverju, ið Javnaðarflokkurin strongdi á at fáa í samgonguskjalið.**

Dupultspælið og órógvið skal steðga. Ein greiður og sjálvstøðugur brúkaramyndugleiki, antin skipaður sum brúkaraumboðsmaður ella brúkaranevnd, skal vera partur av nýggju marknaðarføringslógini. Her verður ongin millumloysn góðtikin.

Heldur Bjarni Djurholm seg ikki til málið, sum tað fyriliggur frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og frá Brúkarasamtakinum, leggi eg sjálvur upprunaliga uppskotið fyri tingið. So kann landsstýrismaðurin standa einsamallur eftir við skommini og sínum útholaða uppskoti.

Vónandi er hetta greitt svar til skilagóða formannin í Brúkarasamtakinum, sum í bløðunum um dagarnar eftirlýsir støðu Javnaðarfloksins til dupultspæl Fólkafloksins í hesum máli.

Sum javnaðarmaður síggi eg stóran týdning í at skipa ein sjálvstøðugan myndugleika við veruligum formati at verja støðuna hjá brúkarunum. Tí haldi eg tað beinleiðis vera eina dáragerð at leggja brúkaraverjuna til Kappingarráðið at umsita. Ikki tí, at mær vantar álit á Kappingarráðnum. Men tí, at hetta er ein stovnur, ið hevur til endamáls at taka vinnulig atlit og tryggja javnbjóðis kappingartreytir ímillum vinnuvirki, meðan brúkaramyndugleikin einans eigur at taka atlit til kundan.

**Mótstríðandi endamál**

Tað kann í ávísum førum vera rætt, tá ført verður fram, at í nøkrum førum tæna Kappingarlóg og Marknaðarføringslóg sama endamáli. Men tað er samstundis púra rætt, tá formaðurin í Brúkarasamtakinum vísir á, at í øðrum førum eru áhugamálini hjá einum kappingarmyndugleika og einum brúkaramyndugleika beinleiðis mótstríðandi.

Brúkaramyndugleikin skal vera ein myndugleiki fyri kundan, fyri brúkaran. Tískil ber, hóast góðan vilja, ikki til at samantvinna funktiónirnar hjá Kappingarráðnum við tær hjá brúkarunum og fáa tær at virka nóg væl og við nóg greiðum myndugleika.

Við hesum er ikki sagt, at Brúkaramyndugleikin og Kappingarráðið ikki møguliga á ein ella annan hátt kunnu samstarva um hølisviðurskifti, embætisfólk og annað líknandi, um hetta á nakran hátt kann gera raksturin bíligari, uttan at tað gongur út yvir greiða myndugleikan hjá báðum stovnunum.

**Brúkaramál eru Javnaðarmál**

Brúkaraviðurskifti eru nakað, sum hevur beinleiðis við rættartrygdina hjá vanliga løntakaranum at gera. Hesi viðurskifti eiga tí beinleiðis at vera javnaðarmál burturav.

Tí var tað eisini, at flokkurin longu 15. januar í 2001 legði eitt uppskot um Marknaðarføringslóg og eitt uppskot um Brúkarakærunevnd fyri tingið. Hesi uppskot høvdu greiðar ásetingar um sjálvstøðuga brúkaranevnd og sjálvstøðugt brúkaraumboð við veruligum myndugleika. Somuleiðis innihelt okkara uppskot um Marknaðarføringslóg greiðar reglur um endurgjald, rættarbann og aðrar beinleiðis revsingar.

Tíverri eydnaðist tað tá Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum at beina fyri brúkarakærunevndini. Í álitinum frá vinnunevndini, sum varð lagt fram í februar 2002, mæltu hesir tríggir flokkar beinleiðis til at fella uppskotið. Grundgevingin frá Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum var, at landsstýrismaðurin hevði sett eina nevnd at endurskoða kappingarlógina. Tjóðveldisflokkurin hevði eina meira nationalistiska undanførslu um yvirtøkur og annað. Málið varð felt við 18 atkvøðum ímóti 8

Hesaferð skal tað ikki aftur eydnast at beina fyri brúkaramyndugleikanum. Hesum hevur Javnaðarflokkurin skyldu at syrgja fyri.